# Tónleika- og framtíðar-stevna í Suðuroynni

**Tann 16. apríl verður forvitnisligt tiltak í Trongisvági, har mentanin og framtíðin verður set á breddan. Tónleikur verður at hoyra og politikarar og onnur siga sína hugsan um framtíðarútlit**

MENTAN
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Tann 16. apríl verður áhugaverdur dagur í Suðuroynni. Tónleikalærarar og onnur arbeiða við at fyrireika tiltak, ið hevur heitið Suðuroyggin og mentanin - um 2 ár og um 10 ár.

Enn er endalig skrá ikki gjørd, men longu er rættiliga greitt, hvør tekur lut og hvussu dagurin kemur at ganga.

Tað eru eini 2 ár síðani, at gongd veruliga kom á tónleikalívið innan Musikkskúlan í Suðuroynni. Ulf Nordlund hevur m.a. havt eydnu við sonevnda suðuroyarmodellinum, har tað m.a. í sera stóran mun verður roynt at fara eftir næmingunum og vekja áhuga fyri tónleikinum. Hetta hevur givið úrslit og eftir stuttari tíð er fjøltáttað næmingaorkestur í Vági, eins og tónleikurin blómar millum næmingar aðrastaðni í oynni.

Í fjør vóru eini tvey líknandi tiltøk. Eitt í Hvalba, har m.a. løgmaður hevði orðið, og tónleikastevna í Trongisvági, har ungu og óroyndu tónleikararnir sluppu at føra seg fram millum landsins royndu tónleikarar.

Nú verður so ljós varpað á tónleikin, mentanina og framtíðina. Arbeitt verður við fyrireikingunum til tiltakið og nærri verður at frætta um tiltakið seinni, men fyribilsskráin sær soleiðis út:

**Skrá**

kl. 12.45
Suðurrättin v/ Oddur Hentze
kl. 13.05
Vælkommen v/ Elin Nielsen
kl. 13.10
Søren Bruun
kl. 13.25
Rútmubólkur v/ Dagfinn Olsen
kl. 13.40
Karin Brattaberg



kl. 13.55
Tvøroyrar Hornorkestur v/ Trondur Enni
kl. 14.20
Kirsten Strøm Bech
kl. 14.35
Ljómur
kl. 14.50
Annlis Bjarkhamar
kl. 15.05
Brandur & Trondur Enni
kl. 15.15
Olavus Jespersen
kl. 15.30
Suðurrättin v/ Oddur Hentze
kl. 15.45
John Johannesen
kl. 16.00
VágSkúlaOrkestur v/ Ulf Nordlund
kl. 16.15
Johan Dahl
kl. 16.25
Harmonika v/Henzar Hammer & Jon Gulak
kl. 16.40
Hans Pauli Strøm
16.55
Tvøroyri Hornork,/Suðurættin/Vágs SkúlaOrkestur

Røðararnir fáa eini 10 minuttir hvør at siga sína hugsan um framtíð og mentan í Suðuroynni.




Stuðul og tryggleiki
til ferðina gjøgnum lívið

Í Føroya Banka hevur tú góðar møguleikar at tryggja teg og familju tína. Her fært tú alt á einum stað - fíggjarráðgeving og tryggleika.

Saman kunnu Føroya Banki og Trygd bjóða allar hóskandi tryggingar til ferðina gjøgnum lívið: Familjutrygging, Sethúsatrygging, Biltrygging, Lán við trygging og Samlagstrygging.

Kom inn í eina av deildunum hjá Føroya Banka ella til Trygd og fá eina trygging, sum hóskar til tín tørv.

TRYGD FØROYA BANKI

WWW.SMYRIL-LINE.COM



FÓLK TIL MÓTTØKUNA Á
NORRÖNU

**Søkt verður eftir fólki til móttøkuna umborð á Norrönu.**

Smyril Line sóknast eftir fólki við royndum á høgum altjóða tænastustigi. Tað er eitt krav, at umsøkjararnir duga væl danskt og enskt í skrift og talu og annars hava kunnleika til hini norðurlendsku málini umframt týskt ella onnur fremmandamál. Tað er ein treyt, at móttøkufólkini hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið.

**Heilsuprógv fyri sjófólk krevst**
(Ikki eldri enn 2 ár).

Tað er ein fyrimunur at hava trygdarskeið
(Ikki eldri enn 5 ár).

Smyril Line bjóðar starv í einum umhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.

Umsóknir og CV skulu vera okkum í hendi innan 1. apríl 2005 og skulu sendast til:

**Smyril Line**
**Manningardeildin**
**Jónas Broncks gøta 37**
**Postboks 370**
**FO-110 Tórshavn**

**Ella við teldupostí til:**
**crew@smyril-line.fo**

J. Broncks gøta 37 · Postboks 370
FO-110 Tórshavn · Tlf: 34 59 00
Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo